# Teir óryndu fingu royndir

*Løgmanssteypið: Í einum týdningarleysum dysti, har báðir venjararnir nýttu møguleikan at hvíla nakrar av stuðulsleikarunum, býttu B36 og B68 stigini sínamillum*

JÁKUP MØRK

B36-B68 0-0 (0-0)

Ikki var talan um tann stóra spenningin, tá oddaliðini bæði í bólki 2 skuldu leika seinasta dystin í bólkaspælinum leygardagin.

Frammanundan var givið, at líkamikið hvussu úrtøkan var í dystinum, so endaði B68 ovast, meðan B36 mátti taka til takkar við øðrum plássi í bólkinum.

Meðan liðini bæði hitaðu upp, varð eisini greitt, at hvørgin av venjarunum hevði í hyggju at satsa nakað serligt í hesum dysti, tí báðum liðunum væntaðu leikarar, sum vanliga teljast millum teir fyrstu ellivu á dómaraseðlinum.

Hjá heimliðnum slapp John Petersen at halda føðingardag heilt uttanfyri hópin, har hann eisini hevði vitjan av álopsfelaganum, Jákup á Borg og miðvallarslítaranum, Jan Guttesen. Harumframt hevði Pelle Andersson eisini sett Mikkjal Thomassen og Jens Kristian Hansen á beinkin.

Hjá B68 hevði Jóannes Jacobsen valt at lata Jan Dam og Arnbjørn Danielsen hvíla seg, so teir heldur eru púrasta klárir, tá tað mánadagin verður farið undir landskappinga.

**Lág leikferð**
Sostatt væntaðu týðandi leikarar á báðum liðum, og satt at siga, so var tað eisini eyðsæð í dystinum, at tað sum so ikki var nøkur katastrofa, um eitt tap skuldi komið framvið.

Ferðin á spælinum var alla tíðina rættuliga lág, og í fyrra hálvleiki var sera langt millum málmøguleikarnar.

Seinna umfarið fingu fáu áskoðararnir eitt sindur meira at rópa um. Eitt sindur meira av ferð og hugflogið kom yvir spælið hjá báðum pørtum, og hetta viðførdi eisini spentar støður framman fyri bæði málini. Største møguleikan mundi Marcelo hava, tá hann gjrødist púra leysur í B36 brotsteiginum. Hann fintaði eitt skot, dróg framvið málverjanum, men tá skotið fall, var tað beint uttanvert stólpan. B36 hevði tó eisini sínar møguleikar, og harumframt høvdu báðir partar orsøk til at ilskast, tí dómarin ikki vildi geva teimum brotsspark.

Mótmælini vóru tó ikki so øgiliga harðlig, og hetta var eisini eitt gott barometur fyri, hvussu stóran, ella lítlan, týdning dysturin hevði.

Sum sagt, so nýttu báðir venjararnir høvið til at geva fleiri ungum leikarum møguleikan, og til teirra rós skal sigast, at eingin teirra dumpaði til próvtøkuna.

**B36-B68 0-0**

Dómari: Oddmar Andresen

**B36:**
Pól N. Joensen - Klæmint Matras, Egil Zachariassen, Herbert í Lon Jacobsen - Kenneth Jacobsen, Rógvi Róin, Ronnie Samuelsen, Håkan Lundholm - Carl H. Høgnesen, Magni á Lakjuni, Dánjarl P. Johansen

**B68:**
Magnus Poulsen - Mannbjørn Nesá, Fróði Benjaminsen, Jákup Eli Olsen - Jan Petersen, Kristian Poulsen, Marlon Jorge, Øssur Hansen, Øssur Jacobsen - Súni Fríði Johansen, Marcello Marcelino



*Fróði Benjaminsen og Magni á Lakjuni taldust millum royndu leikararnar, sum vóru á vøllinum leygardagin*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Lítil ferð í Fuglafirði

*Løgmanssteypið: Frísparksmálið, sum Eyðálvur R. Petersen skoraði, verður mett at verða evni til ársins mál*

ÍF-B71 1-0 (0-0)

Tá sandoyingar vitjaðu í Fuglafirði páskaaftan vóru bæði teir hjá ÍF og teir hjá B71 longu frammanundan dystinum greiðir yvir, at hvørki liðið hevði møguleika at røkka fjórðingsfinaluni.

Talan var sostatt um at spæla um æruna, og í tí stríðnum løgdu teir á heimaliðnum, sum saknaðu Rúna Petersen meiri fyri. Hjá B71 var Eli Hentze ikki við. Hann hevði trupulleikar við rygginum, og teir valdu at goyma hann til landskappingardystin 2. páskadag. Tað sást lítið til skipað og flótandi fótbóltsspæl. Har vóru nógvir høgir bóltar og nógvar skeivar sendingar, og ofta gekk tað nógva fyri seg á einum lítlum øki.

Uppløgdu málmøguleikarnir vóru fáir. ÍF hevði ein stóran í 1. hálvleiki, og hjá sandoyingum gjørdist Jógvan Jón Petersen, sum hesa ferð var í álopinum, púra leysur í 2. hálvleiki, men tað spurdist einki burturúr, tí hann skundaði sær ov nógv at skjóta.

ÍF fekk sigursmálið tíðliga í 2. hálvleiki, og tað var vorðið sum mál. Sandoyingar gjørdu manngarð, tá ÍF fekk fríspark stutt uttanfyri brotsteigarmarkið eitt sindur til vinstru. Eyðálvur R. Petersen royndi móti málinum, og í besta Beckham stíli eydnaðist tað honum at skrúva bóltin upp um manngarðin. Bólturin tók stólpan ovarlaga, áðrenn hann fór í málið. Kanska Valdemar Nowisci leit í so nógv á manngarðin, tí hann stóð heilt yviri við hin stólpan. Men spurningurin er, um hann hevði megnað at gjørt nakað við frágera góða skotið.

Sandoyingar høvdu Høgna Hansen, havnarmannin, sum í fjør spældi við ÍF, í álopinum. Í 2. hálvleiki skiftu teir Kristoffur Vidtfeldt, Kára Sørensen og Mourits Viderø inn, men tað segði tað sama.

2. deildarliðið vann stríðið móti 1. deildarliðnum um keisarans skegg. Hjá ÍF komu í 2. hálvleiki Jákup Baldvinsson og Henry Margar Petersen á vøllin.

JH

**ÍF–B71 1–0 (0–0)**
1–0: Eyðálvur R. Petersen 51.

Dómari: Niklas á Líðarenda

**ÍF:**
Allan G. Joensen – Viggo Johannesen, Torstein Joensen, Alvi Justinussen, Tomek Prybilski – Eyðun Ryggshamar, Høgni Zachariassen, Mortan Thomsen, Ken Bærendsen – Eyðálvur R. Petersen, Bárður á Lakjuni

**B71:**
Valdemar Nowisci – Bernhard Petersen, Bergleif Sólskeir, Jón Brekku, Ernst Løkjá, Kristian Nielsen – Rúni í Soylu, Julian Floresco, Kári Nielsen – Høgni Hansen, Jógvan Jón Petersen

# NSÍ tryggjaði seg

*Løgmanssteypið: Klaksvíkingar høvdu bara fýra av teimum fyrstu ellivu á liðnum, tá teir taptu 2–0*

KÍ hevur ikki enn formliga vunnið bólk eitt enn, men skulu vit meta út frá atburðinum páskaaftan, so munnu teir í Klaksvík halda, at fyrsta plássið er vunnið.

NSÍ kom til Klaksvíkar við so at siga besta liðnum. Undaøtøkini vóru Arnfinn Langgaard, sum varð skaddur móti VB, og Djóni Nolsøe Joensen, sum var smáskaddur og tískil varð spardur til 2. páskadag.

Setningurin hjá NSÍ var at fáa stig fyri at tryggja sær pláss í fjórðingsfinaluni. Tað eydnaðist við tveimum málum. Hitt fyrra fingu teir í 27. minutti. Gert Langgaard var fyrstur á, eftir at Meinhardt Joensen hevði hálvbjargað roynd frá Iani Højgaard.

Seinna málið kom, tá tað restaði eitt korter. NSÍ skifti í 2. hálvleiki tríggjar frískar menn inn. Teir vóru Jan Nónklett, Eddie Mikkelsen og Sonni L. Petersen. Tað vóru teir báðir síðst nevndu, sum áttu seinna málið. Eddie Mikkelsen krúllaði fleiri av í vinstru, áðrenn hann sendi innfyri til Sonna L. Petersen, sum var púra blankur.

**Nógvir hvíldu**
Hjá KÍ hildu nógvir av teimum fyrstu ellivu frí. Fleiri unglingar og aðrir, sum eru uttarlaga í 1. deildarhópinum, fingu høvi at royna seg, og hóast teir taptu, so var talan um íløgu í framtíðina, tí teir fingu dystarvenjing í 90 minuttir.

Sum seinna umfarið leið flutti KÍ, sum setti Erling Fles og Leon Bjartalíð á vøllin, fólkið langt fram. Teir hildu seg vera snýttar fyri eitt brotsspark, men dómarin metti, at Hjalgrím Elttør varð feldur dygst uttanfyri brotsteigar markið, og einki kom burturúr frísparksroyndini. Og so var tað, at NSÍ økti til 2–0.

**KÍ–NSÍ 0–2 (0–1)**
0–1: Gert Langgaard 27.
0–2: Sonni L. Petersen 75.

Dómari: Petur Reinert

**KÍ:**
Meinhardt Joensen – Niclas Niclassen, Andrzej Pacek, Fríðin Ziskason, John Ryan – Hjalgrím Elttør, Símun Joensen, Rógvi Laksáfoss, Jógvan á Lakjuni – Arnhold Joensen, Jóannes L. Jacobsen

**NSÍ:**
Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Dánial Hansen, Kári Hansen, Jónstein Petersen – Ken Nónklett, Ian Højgaard, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Mortan Hansen, Christian Høgni Jacobsen



# FS Vágar er nú fremst

*Løgmanssteypið: Heldur óvæntað vann FS Vágar útidystin móti GÍ, og ikki minni minni óvæntað hava vágamenn nú lagt seg á odda framman fyri bæði GÍ og HB*



*Heldur óvæntað vunnu vágamenn dystin í Gøtu, og við sigrinum hava teir tryggjað sær heitið sum besta tveyari*

***Mynd: Jonhard Hammer***

JÁKUP MØRK

GÍ-FS Vágar 2-3 (0-0)

GÍ hevði leygardagin møguleikan at tryggja sær fyrsta plássið í bólki 3 í kappingini um løgmanssteypið. Ein sigur á heimavølli móti felagsliðinum úr Vágoynni, hevði viðført, at gøtumenn høvdu tryggjað sær fremsta sessin, hóast teir enn hava ein dyst eftir at leika.

Tað var helst eisini væntandi, at gøtumenn skuldu halda øll stigini eftir í Gøtu. Ikki tí, FS Vágar hevur longu prógvað, at teir kunnu gerast tungir at syfta hjá hinum feløgunum, men kortini er munur á teimum úrslitum, sum liðini bæði hava havt í nítiárunum. Fyri FSV hevði eitt tap heldur ikki gjørt tað stóra, tí longu undan dystinum var greitt, at teir í øllum førum skuldu endað millum teir báðar bestu trýararnar í bólkaspælinum, og sostatt var víðari luttøkan longu tryggjað, áðrenn farið varð á vøllin leygardagin.

**Málrok í seinna hálvleiki**
Kanska var tað júst hetta, sum gjørdi, at vágamenn kundu spæla somikið frígjørt, sum teir í veruleikanum gjørdu.

Fjálturin á leikarunum var ikki hin stóri, og beinanvegin var greitt, at gøtumenn í øllum førum ikki skuldu vænta sær at fáa stigini til gávu.

Fyrri hávleikur kastaði einki mál av sær, men stutt inn í seinna hálvleik eydnaðist tað at leggja seg á odda við einum skotið frá liðskiparanum, Magna Jarnskor. Leiðslan helt sær í góðar tíggju minuttir, so hevði John Johansen javnað fyri vágamenn, og nakað seinni eydnaðist tað Jack Johansen at leggja vágamenn fram um.

Løtu seinni var Magni tó aftur upp á spæl, og hann fekk aftur skapt javnvág, soleiðis at støðan nú var 2-2.

Sostatt var líkt til, at dysturin skuldi enda við javnleiki, men tá einir 10 minuttir vóru eftir av dystinum fingu vágamenn brotsspark. John takkaði fyri møguleikan, og við seinasta málinum í dystinum trýstið hann felagsliðið upp á ovastu rók í bólkinum.

Úr Gøtu frætta vit annars, at talan ikki var um slíkan dyst, sum verður festur í minnið. Yvirhøvur var leikferðin lág, men samanumtikið skilst kortini, sigurin hjá vágamonnum var í lagi.

**Gerast tveyarar**
Hóast teir sostatt eru á fremsta sessinum í løtuni, so er longu nú greitt, at vágamenninir mugu taka til takkar við øðrum plássinum í bólkinum. HB og Gí hava enn ein sínámillum dyst at avgreiða, og avgerin um fremsta plássið í bólkinum fellur í hesum dysti. Ein sigur til HB merki, at teir gerast fremstir í bólkinum, meðan javnleikur ella GÍ sigur hevur við sær, at tað verður GÍ, sum verður fremst.

Undir øllum umstøðum gerast vágamenn tveyarar í bólkinum, og uttan at niðurgera vágamenn, so er hetta helst eitt úrslit, sum teir eru væl nøgdir við, havandi í huga at teir hava verið í bólki saman við liðunum, sum gjørdust ávíkavist nummar tvey og fýra í landskappingini undanfarna kapingarár.

**GÍ-FS Vágar 2-3 (0-0)**
1-0 Magni Jarnskor 51.
1-1 John Johansen 63.
1-2 Jack Johansen 70.
2-2 Magni Jarnskor 73.
2-3 John Johansen (br.) 80.

Dómari: Jens Petur Brattalíð

**GÍ:**
Sunnvard Joensen - Leivur Hansen, Bartal Eliasen, Áslakur Petersen, Súni Olsen - Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Helgi L. Petersen - Rúni Justinusen, Óli Hansen, Hans Pauli Petersen

**FS Vágar:**
Remi Mikotionis - Emil Hentze, Pól Kjartan Thomsen, Zilva Zudis, Jack Johansen - Sonni Johansen, Jóhannus Olsen, Ari Thomassen, Tór Ingar Akselsen - Birgir Joensen, John Johansen

# TB fekk ikki mannað lið

*Orsakað av hópatals skaðum, fekk TB ikki mannað lið, tá teir skírishósdag á útivølli skuldu hitta FS Vágar*

JÁKUP MØRK

Dysturin millum FS Vágar og TB, sum ætlandi skuldi verið leiktur skírishósdag, varð av ongum, tí tvørámenn góvu avboð til dystin.

**Níggju mans skaddir**
Oddur Dimon, sum er umboðsmaður fyri 2. deildarliðið hjá TB, sigur við Sosialin, at orsøkin heilt einfalt var tann, at teir ikki sóu seg førar fyri at manna lið.

Hann greiður frá, at teir í løtuni hava heili níggju mans, sum eru meira ella minni skaddir, og at teir ikki sóu nakra nyttu í at fara vestur at spæla dystin.

- Eg veit ikki hví, men vit hava verið ótrúliga óhepnir við skaðum higartil. Beint sum steypakappingin byrjaði, byrjaðu skaðarnir eisini. Undanfarna vikuskiftið stóð longu heilt illa til, og tá vit so aftur fingu tveir mans skaddar í Gøtu, var heilt galið, greiður Oddur frá.

Í fyrsta umfari gjørdi TB so av, at søkja fótbóltssambandið um loyvi til at taka liðið úr kappingini, men hesum sýtti FSF fyri, og tískil sóu teir seg noyddar at gera avboð til dystin, eins og teir longu hava givið avboð til dystin móti HB, sum ætlandi skuldi verða leygardagin, páskaaftan.

**Harmast um støðuna**
Oddur sigur seg sjálvsagt harmast um støðuna, men hann leggur samstundis áherslu á, at hetta stig var avgerandi neyðugt, til tess at kunna hava eitt nøkunlunda lið, tá landskappingin fer í gongd mánadagin.

- Vit kundu sjálvfylgiligt roynt at lappa onkran leikara, soleiðis at hesin fekk leikt, men úrslitið hevði helst verið, at skaðarnir versnaðu, og hetta hava vit ongan áhuga í, greiður Oddur frá.

**Ongan annan møguleika**
Børge B. Hansen, formaður í kappingarnevndini hjá FSF, greiður frá, at teir á fundi viðgjørdu umsóknina hjá TB um loyvi til at taka liðið úr kappingini. Hesum sýttu teir fyri, tí hetta vildi viðført, at FS Vágar, sum nú hevur átta stig, hevði mist seks av hesum stigum, og sostatt hevði havt munandi verri møguleika at leika seg í fjórðingsfinaluna. -At TB so velur at geva avboð til dystirnar, kunnu vit so einki gera við, men sjálvandi er tað at harmast um, sigur Børge við Sosialin.

Onkur hevur ført fram, at tá GÍ er einasta lið, sum hevur leikt tveir dystir móti TB, førir hetta við sær, at teir nú hava nógv betri málúrtøku enn bæði HB og FSV, men Børge sær tó ongan vanda í hesum. Undan hesum kappingarárið varð skipanin broytt, soleiðis at tað nú eru innanhýsis uppgerðirnar, sum telja, um tvey lið standa á jøvnum í stigum.

Spurdur, um avboðini fáa nakrar avleiðingar fyri TB, svarar Børge, at ítróttarliga fær hetta ongar avleiðingar, men at felagið helst fær álagt eina sekt, fyri ikki at møta upp til dyst.



# VB er framvegis við

*Við einm tryggum sigri á Sumba, varðveittu vágbingar møguleikan fyri framhaldandi luttøku í kappingini um løgmanssteypið*

JÁKUP MØRK

VB-Sumba 4-0 (3-0)

Treytirnar undan dystinum vóru púrasta greiðar fyri VB, tá teir leygardagin á heimavølli tóku ímóti grannunum úr Sumba. Skuldi víðari luttøka í steypakappingini gerast veruleiki, var neyðugt hjá VB at vinna dystin, og allarhelst somikið trygt, at sumbingar ikki kundu vinna munin aftur, tá liðini um tvær vikur skulu avgreiða útsetta dystin.

**Nógvur vindur**
Úr Vági frætta vit, at vindurin suðuri á Eiðinum var nógvur, og at hetta eisini darvaði spælinum almikið.

Tó so, vágbingar lótu kortini ongan iva vera um úrslitið. Við málum frá Jóan Paula Olsen, Kristof Popzynzki og Robert Cieslewicz eydnaðist teimum at fara til hálvleiks við tryggari leiðslu, og so ráddi bara um at verja borg seinastu trý korterini.

Hetta eydnaðist eisini, og fyri at seta krúnuna á verkið, eydnaðist tað eisini Jóan Pauli at skjóta enn eitt mál móti endanum av dystinum, soleiðis at munurin gjørdist heili fýra mál.

Vágbingar eru nú so at siga tryggjaðir víðari luttøku í steypakappingini, og hetta munnu teir hóast alt ikki vera so illa nøgdir um.

Í teoriini kann Sumba enn taka sessin frá VB, men til hetta krevst, at Sumba vinnur útsetta dystin móti VB við fimm málum, og tað er neyvan at meta sum nakar realistiskur møguleiki.

**VB-Sumba 4-0 (3-0)**
1-0 Jóan Pauli Olsen 20.
2-0 Kristof Popzynzki 32.
3-0 Robert Cieslewicz 38.
4-0 Jóan Pauli Olsen 90.

Dómari: Kim Ejdesgaard

**VB:**
Bjarni Johansen, Magni Jacobsen, Eyðun Jacobsen, Eyðun Kjærbo, Michael í Lágabø, Janus Kjærbo, Kristof Popzynzki, Palli Augustinussen, Robert Cieslewicz, Jóan Pauli Olsen, Milan Kuljic

**Sumba:**
Fróði Mortensen, Marlon Kjærbo, Bergur Winther, Trygvi Nielsen, Sólfinn Kjærbo, Spasoje Biberdzic, Sonni Kjærbo, Robert Larsen, Jón Lisberg, Heini Vestergaard, Rene Thomsen